Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, um Getsemane:

# Andalig øsing kann elva til

**– Her er talan um ung fólk, sum verða útsett fyri eini ómetaligari andaligari og sálarligari ávirkan, umframt bólkatrýsti. Hetta kann vera ein farligur kokkteylur, sum kann framprovokera eina latenta sálarørsku, ið annars hevði ligið undir vatnskorpuni. Eg veit tað, tí eg havi sæð tað í ólukkumát, sigur Eyðun Joensen**



*Eyðun Joensen var sálarfrøðingur á Landssjúkrahúsinum í tríati ár, til hann herfyri fór frá fyri aldur*

ÁTRÚNAÐUR OG UNGDÓMSMENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í dag hava vit sett Eyðun Joensen stevnu. Hann var sálarfrøðingur á Landssjúkrahúsinum í tríati ár, til hann herfyri fór frá fyri aldur. Eyðun hevur, gjøgnum eitt drúgt og fjølbroytt arbeiðslív, verið vitni til eitt sindur av hvørjum. Og tað er við barlast, útbúgving og royndum hansara í huga, at vit heita á hann, um at greiða okkum frá, hví foreldur í Klaksvík eru so ørkymlað av nýggjastu samkomugreinini á trúðartræi norðoyinga, sum er vorðið samrøðuevni til hvønn føðingardag og bindiklubb um landið.

## Evsta ábyrgdin

Vit leggja fyri og spyrja Eyðun, um hendan samkoman er nakað øðrvísi enn aðrar lívligar ungar samkomur.

Varliga leggur hann hendurnar saman. Og eyguni. Bendir seg framá og lýtir inneftir. Leitar og vigar orðini. Og hann staðfestir, at hendan samkoman, fyri ein týðandi part, er øðrvísi enn aðrar samkomur, sum eru virknar í dag.

Og hann sigur, at munurin gerst greiður, tá hugt verður at aldurssamansetingini og ábyrgdarbýtinum í samkomuni. Tí, í fyrsta lagi vendir hon sær mest til ungdómar ella ómyndingar, sum Eyðun rópar tey, og í øðrum lagi er talan um eina unga kjallarasamkomu, har torført er at fáa greiði á, hvør hevur evstu ábyrgdina, um farið verður út um mark.

– Aðrar samkomur hava eitt elstaráð ella stýri við fleiri limum, sum eru oman fyri pastorin. Í hesum førinum er sostatt talan um ómyndingar, sum flokkast um ein ella tveir oddafiskar, sum í roynd og veru hava alla ábyrgdina fyri tí, sum fer fram, sigur Eyðun, og hann heldur fram:

– Nú skilji eg, at hendan samkoman er rættiliga vill. Tað hava samkomur verið fyrr, og tað er í sjálvum sær eingin trupulleiki. Men teir, sum skipa møtini, standa einsamallir við eini ómetaliga stórari etiskari ábyrgd, og er tað uttan iva tað, sum ørkymlar foreldrini í Klaksvík. Tey kenna á sær, at tey hava ongan at venda sær til, um farið verður út um mark. So, tá børnini broyta atburð ella torført er at koma í samband við tey, hava foreldrini ongan at venda sær til.

## Sosialpsykologi ella gudfrøði

Í Getsemane er endamálið at fáa ung fólk at venda sær til Harran. Eyðun Joensen sigur, at ungdómur sum málbólkur er serstakliga kensluligur, følin og hevur tunna húð uttan á persónligheitini. Hann rópar tað, at tey eru moyr og lœtt at ávirka.

– Í grein í Dimmalætting sigur pastorurin, at málbólkurin er ungdómar millum 15-25 ár, sum dragast við lívsins spurningar. Talan er sostatt fyri ein part um ómyndingar, og við beráddum huga kemur hendan samkoman og sigur: Vit hava eini boð at bera og tey eru omanfyri alt – tað er Kristus, sigur Eyðun, sum samstundis leggur dent á, at religión ella religiøs ávirkan, ikki er ring í sjálvum sær.

– Men tað valdast sanniliga, hvussu tað verður borðreitt. Her er talan um ung fólk, sum verða útsett fyri eini ómetaligari andaligari og sálarligari ávirkan og ikki minst bólkatrýsti. Hetta kann vera ein farligur kokkteylur, sum eg vil sammeta við andaliga neyðtøku, sigur Eyðun.

Og hann greiðir frá, at av tí, at tá talan er um ómyndingar, kemur pastorurin í andsøgn við foreldrini, tí tey hava myndugleikan.

– Foreldrini vilja ikki styggja børnini meira frá sær, og kanska av góðum grundum tora tey ikki at handhevja foreldramyndugleikan og reka børnini heim, tá tey liggja og sløðast úti til langt út á kvøldarnar, sigur Eyðun.

## Frykta at missa børnini

Sambært fólkum, sum vit hava prátað við, eru nøkur, sum fegnast um, at børn teirra hava funnið frið í samkomuni, tí tey vóru komin inn á eina lívsleið, við villum náttarlívi, rúsevnum og tílíkum. Men bæði foreldur, sum vit hava prátað við í sambandi við hesa grein, og foreldur, sum hava úttalað seg til aðrar fjølmiðlar, siga seg vera ikki sørt ráðaleys og í villareiði yvir, at øll frítíðin hjá børnunum fer til samkomuna, og at børn teirra vilja ikki siga frá øllum tí, sum fer fram innanveggja.

– Eg upplivi tað soleiðis, at foreldrini hava ongastaðni at fara við sínum kvalum um at hava mist børnini til samkomuna. Tey kenna tað sum hava tey mist tamarhaldið á børnunum, tá tey eru úti til religiøsar seansur út á næturnar. Sjálvur hevði eg verið mest ólukkuligur yvir, at barnið valdi heimið frá, og at tað valdi samkomuna fram um familjuna, sigur Eyðun Joensen.

## Ábyrgdarbýtið

Vanliga hava samkomur og missiónshús eitt ráð ella eitt stýri, sum er yvir pastorinum